**EL-GUITARI**
12 streingjaður el-guitari – Yamaha PAC-303-12, sum nýggjur, selist fyri 2.500 kr.
*Tlf. 421419*

**GUITARFORSTERKARI**
Marshall DSL 401, 40 watt rørforsterkari við transportkassa selist fyri 4.500 kr.
*Tlf. 421419*

**GUITARI YNSKIST**
Hevur onkur ein lítlan guitar at selja okkum, so vinarliga ring
*Tlf. 448886*

**YAMAHA ANLEGG**
Lítið brúkt Yamaha hi-fi anlegg (2x120 W) forsterkari og cd-spælari til sølu fyri 6.000 kr. Tað er ljósagrátt og sær sera væl út. Nýprísur 10.000 kr.
*Tlf. 441991 ella 254391*

**TIL SØLU**
Syntesizer til sølu. Ring og gev eitt boð.
*Tlf. 212533*

**TIL SØLU**
Mix pultur Mackie SR 24X4, t.v.s. 24 kanalir + 4 subkanalir + 4 Aux sends og 4 Aux Returns, harav 2 í stereo. Frá 1995. Kostnaður 6.000,-
*Tlf. 227634 ella 455880*

**BILSTEREO TIL SØLU**
Sony bilstereo, Pioneer forstyrkjari og subwoofari til sølu fyri 3.500 kr. Nýprísur yvir 7.000 kr. Nærri uppl. á www.sigvardsen.net ella
*Tlf. 252215*

**BILSTEREOANLEGG**
Ein Pioneer fløguspælari, 4 MDS hátalarar, W við diskantum, ein forsterkari, 4x100W, ein 600 W subwoofari og 4 deilifiltur, bíliga til sølu.
*Tlf. 250501, e. kl. 17*

## Út- & Sjónvarp

**SJÓNVARP**
Brúkt sjónvarp heilt bíliga til sølu.
*Tlf. 315636*

**BRÚKT SJÓNVARP**
fæst við at avheinta tað.
*Tlf. 310649*

**HEIMA BIO ANLEGG**
bíliga til sølu.
*Tlf. 212717*

**PARABOLSKIPAN**
Analog parabolskipan: Amstrad móttøkukassi (2 slot), parabolskál 85 cm og høvd, til sølu fyri 800 kr.
*Tlf. 332494*

## Ymiskt

**KOWA TS-611**
Spotting Scope (kikari) 60 mm linsu Zoom 20-60x við tasku. Nýprísur 6.000 kr. til sølu fyri 3.000 kr.
*Tlf. 318675*

**SVINGTRAPPA**
úr límtræi – hædd uml. 260 cm. br. 80 cm. til sølu fyri 6.000 kr.
*Tlf. 318675*

**YNSKIST**
Hava tygum eina góða kondisúkklu, sum vit kunnu keypa ella fáa?
*Tilhaldið í Tórsgøtu, tlf. 316491*

**TIL SØLU**
Stórt stykki úti á Stongum í Sørvági til sølu, summarhús ið krevur ábøtur, hoyrir til.
*Tlf. 333193 ella 213193*

**GALLERÍ VÁGSBOTN**
fer at hava søluframsýning av gomlum lutum og antikvitetum á torginum í SMS 4. mars og vikuna út. Um nakar hevur gamlar lutir ella málningar, so ring tlf. 314293 ella 214293. Um nóg høgt boð fæst, selist málningur av Kristin í Geil, Ingálvi av Reyni, Zacharias Heinesen, Sigmund Petersen, S. J. Mikines o.fl.
*Gallerí Vágsbotn*

**10 DVD FILMAR**
til sølu samlað fyri 1200 kr. Ghosts of mars, X-Charge, Shriek if you know, what I did last friday the 13th, Blair Witch 2, Christinas House, Charlies Angels, Halloween 4, American Pie, Hannibal, UFC Hits »Real Fighting«.
*Tlf. 253950*

**FARTELEFON**
Motorola Star-Tac GSM fartelefon til sølu fyri 400 kr.
*Tlf. 251751*

**TÓGV!**
Vit sóknast eftir tógvi. Alt hevur áhuga.
*Tilhaldið, tlf. 316491*

**BINGJA**
Ein 20 fót, isolerað bingja til sølu.
*Tlf. 318196*

**TRAPPA TIL SØLU**
Kvartsving trappa, vinstra, frá 1935 við snaraðum snældum. Mát: 225x90 cm. Hædd 267 cm.
*Tlf. 215324*

**POOL-BORÐ**
til sølu fyri 6.000 kr.
*Tlf. 452118 - 287934*

**TÚ, SUM SAMLAR**
uppá lyklaringar, ring til mín, so fært tú eina rúgvu!
*Tlf. 315991 - 215991*

**FARTELEFON TIL SØLU**
GSM-fartelefon av slagnum Bosch 909s við løðara til bil til sølu fyri 300 kr. Núverandi nýprísur: 1700 kr.
*Tlf. 224565*

**ERICSSON TELEFON**
Ein seks mánaðar gomul grøn Ericsson T 20 fartelefon við ladara og lumma til sølu fyri 1000 krónur.
*telf. 252115*

**YNSKIST**
Pylsukókari og búffsteikjari ynskjast til keyps.
*Tlf. 260389*

**FERÐASEÐIL**
v/ Norrønu til Danmarkar 8. mars og heim aftur 16. mars í 2-manskamari til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 211443*

**TIL SØLU**
Ein Riccar overlook seymimaskina til sølu fyri 2.000 kr. So gott sum nýggj.
*Tlf. 455443*

**FERÐAST SAMAN?**
Eg søki eftir einum at ferðast saman við vikuskiftið 28.3. til 1.4. við Atlantsflog til Aberdeen.
*Tlf. 319252*

**FERÐAST SAMAN?**
Vágar-Kbh.-Vágar 9.–17. mars ella 16.–24. mars. Ring á
*Tlf. 321306*

**YNSKIST**
Eigur nakar elektriskt hegn at selja mær?
*Tlf. 287764*

**FERÐAST SAMAN**
Eg søki eftir einum at ferðast saman við vikuskiftið 28. febr.–4. mars.
*Tlf. 371601*

**LISTAFÓLK**
Gallarí í Danmark sóknast eftir ungum, føroyskum listafólkum. Møguleiki er fyri framsýning og sølu í Danmark. Send foto av tínum verkum og skriva eitt sindur um teg sjálvan. Eyðálvur Carlsson, 335 Leynar, tlf. 250485,
*carlsson@post.olivant.fo*

**KAVARAÚTGERÐ**
Komlett kavaraútgerð til sølu. Stødd large-xlarge. Selist bert samlað.
*Tlf. 215614 - 313769*


**AKFØR**
· Variant viðfestivognar nógv model!
· Sleipikrókar til øll bilmerki
· Arbeiðsskúrar nógv model!
Kaj Andreasen & Co
Tel. 315600 - Fax 318008


# FÓLK til Griffilin

**Søkt verður eftir fólki at arbeiða hálva tíð**

Vit sóknast eftir fyrikomandi, ágrýtnum fólki, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Arbeiðstíðin er aðruhvørja viku fyrrapart, aðruhvørja viku seinnapart og annaðhvørt vikuskifti.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan handil, men hetta er tó eingin treyt.

Tú kanst byrja beinanvegin.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so send okkum eina skrivliga umsókn ella ring og tosa við Róa Kalsø á tel 310840.

griffilin SMS

# Ergo-/Fysioterapeutur til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er fulltíðar starv sum Ergoterapeutur/Fysioterapeutur leyst at seta sum skjótast.

HTM er deild á Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 8 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar.
- tværfakligt samstarv - innan- og uttanhýsis

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- útbúgving sum ergoterapeutur / fysioterapeutur
- royndir frá líknandi arbeiði ella frá eyimunur
- góð samstarvsevnir
- hollan telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- samskifti við viðskiftafólk
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 318300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 5. mars 2002, kl. 14[00].

# KT fólk til ORACLE á Hagstovuni

Vit sóknast eftir einum væl útbúnum starvsfólki til KT deildina.

Arbeiðið á Hagstovuni er skipað á tann hátt, at flestu hagtalsuppgávur verða loystar í samstarvi millum hagfrøðingar og KT starvsfólk, og tað er til slíkar verkætlanir, at vit sóknast eftir einum fólki.

KT skipanirnar á Hagstovuni eru grundaðar í einum ORACLE umhvørvi við bæði UNIX og WINDOWS teldum. Í arbeiðinum á KT deildini verða brúkt ORACLE menningaramboðini SQL, PL/SQL, DEVELOPER og DESIGNER.

Kunnleiki til eitt ella helst fleiri av hesum amboðum er ein fortreyt.

Trý fólk eru í KT-deildini, og eru tey uppi í øllum verkætlanum á stovninum. KT arbeiðið á stovninum er eyðkent av, at nýggjar skipanir alsamt verða mentar, samstundis sum verandi skipanir verða viðari mentar. Sostatt er arbeiðið ógvuliga fjølbroytt og møguleiki er at royna seg á nógvum KT økjum.

Starvið verður lønt í samsvari við førleikar og starvsinnihald, sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknarfreistin er 15.mars 2002.

Til at fáa meira at vita um starvið, set teg í samband við Berg Dam ella Hermann Oskarsson á Hagstovu Føroya, telefon 35 28 00.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2667, Sp/f Telco Faroe, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Frans Jan Waterman, Poolster 84 450 1m, GN Nederland (formaður), Poul Johannes Gunleif Johannesen, Marknagilsvegur 99, 100 Tórshavn og Torleivur Magni Mikkelsen, Marknagilsvegur 55, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Torleivur Magni Mikkelsen, Marknagilsvegur 55, 100 Tórshavn.

Felagið er tann 30.11.2000, farið í likvidatión við Bjørn á Heygum, advokati, Bøgøta 16, Box 164, 110 Tórshavn sum likvidator.

Skráseting Føroya tann 25. februar. 2002.

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1454, P/F Kaj Joensen, 100 Tórshavn.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Ásvør Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
Grannskoðari:
Farin frá sum grannskoðari: Grannskoðaravirkið Højmose, v/ Børge Christiansen, í Heiðum, 370 Miðvágur.
Innkomin sum grannskoðari: Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 26. februar 2002

Kristin Balle



# HEILSANIR



**Hey, góða!**
Tillukku við degnum í dag. Øll góð ynski til tykkum bæði á myndini.
**Heilsan, mamma, babba, Kaj og Eyðstein**



**Góða, elskaða Noomi Jóhanna**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 28. febr. Jesus pápi signi framtíð tína ynskja
**omma og abbi á Villingadalsvegnum**



**Góða Rakul**
Hjartaliga tillukku á 11 ára føðingardegnum í dag. Øll góð ynski frá
**ommu og abba í Havn**



**Góða Anja**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum, sum var tann 16. febr. Eisini ein heilsan til mammu, sum fylti 30 27. febr.
**Heilsan, omma og abbi**



**Góði Heini!**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum. Eisini ein heilsan til Jákup frá
**ommu á Bjarnoyarvegnum**



**Góði, elskaði Heini!**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Bestu heilsanir, mamma, babba og Jákup**



**Góða Sólvá**
Hjartaliga tillukku á tínum 6 ára degi.
**Kærar heilsanir, omma**



**Góða, elskaða Jensa Askildsen**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum. Jesus pápi signi teg.
**Heilsan, Alma omma**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku á 30 ára degnum 27. febr. ynskja
**Anja og Edna**



**Góða Helena**
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum 27. febr. Eisini ein heilsan til Tummas og Høgna.
**Heilsan, mostir í Danmark**



**Ein heilsan til Femju Fróðadóttur Mortensen**
Góða Femja, hjartaliga tillukku við 7 ára degnum í dag og alt tað besta ynskja
**omman og gubbin**



**Góði Joar Mathias**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum. Vit elska teg.



**Góða Femja**
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum í dag ynskja
**mamma og pabba**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mið-degi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .......................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«